Skrivstovufólk til hálvdagsstarv

Søkt verður eftir fólki til hálvdagsstarv. Starvið umfatar bókhald, umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Ískrivandi krav
- Bókhaldsroyndir
- Kunnleika til Navision og Word
- At viðkomandi er nærlagdur og hevur góð samstarvsevni

Umsókn við meguligum prógvum og viðmælum, skal vera okkum í hendi, í seinasta lagi 14.03.03

REVISIÓN

Stóðalág 4 • 100 Tórshavn • Tlf. 316037 • Fax. 319052

Sjálvfeivislin veitir tvennar ferðir fyrir tvo um gamalárskvöld, bókhald, eitt kaffilag, ókeypis og tálgávving hetsmat viðfeldnt. Á vitskifta starvsmenn 3 fólk, sum skulu vera gamalsfólk, eitt skrivstovufólk vil bøta tálgávving og ein leiðsagar.

Kunngerð
um innan- og uttangarðsútskiftingarfund á Syðradali K.

Til viðgerðar verður innan- og uttangarðsútskifting av Syðradals bygd.

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, broytt við løgtingslóg nr. 41 frá 31. mars 1995, § 9, verður boðað til útskiftingarfund mikudagin 4. juni kl. 11 á Syðradali.

Nevndarlimir eru: Jákup Skoradal, Miðvágur og Inger Merete í Brekkunum, Hósvík.

Tórshavn, tann 28. februar 2003

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður

Dagrøktari søkist

Søkt verður eftir dagrøktara til dagrøktarskipanina í Skála kommunu, at byrja 1. apríl og fyribils til summarfrítíðina 15. juli 2003.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal vera soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Umsóknirnar skulu vera dagrøktarleiðaranum í hendi í seinasta lagi 17.3.2003.

Áhugað kunnu venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 227393 ella 442059.

Skála Kommuna

Roknskaparleiðari

Til eitt handilsvirki við høvuðssæti í Tórshavn verður søkt eftir einum roknskaparleiðara. Í bókhaldinum starvast frammanundan tvey fólk, men tøvrur er á einum fólki afturat at standa fyri roknskapardeildini.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhalds- og roknskapararbeiði og aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum hoyra til hetta.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góðan kunnleika til bókhald og roknskap og vera førur fyri sjálvstøðugt at leiða arbeiðið. Praktiskar royndir frá vinnulívinum eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe (Joen Magnus Lamhauge).

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. mars 2003.

RASMUSSEN & WEIHE
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PricewaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 351700
Fax (+298) 351701
e-mail:
rasmussen@rasmussen.fo
www.rasmussen.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir arbeiðsfólki at byrja beina vegin, til vanligt viðlíkahaldsarbeiði í sambandi við veg- kloakk og vatnarbeiði í kommununi.

Nærri fæst at vita við at seta seg í samband við Snarskivuna á tlf: 315160.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Undirvísingarhøli

Tórshavnar Kvøld - og Ungdómsskúli sóknast eftir undirvísingarhølum, sum eru størri enn 200m², høli skal nýtast til handverk og handaligt arbeiði.

Nærri fæst at vita við at seta seg í samband við Napoleon Nólsoy, stjóra, á telefon 317755.

SNARSKIVAN

Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA

verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** 1. og 2. apríl 2003 og á **Landssjúkrahúsinum** 3. apríl 2003.

Tíð fæst við at ringja á **tlf. 45 54 63**, mánadag og týsdag kl. 10-12, í seinasta lagi mikudagin 25. mars 2003.

Frá Almanna- og Heilsurøktarafelagnum

Aðalfundur felagsins verður í hølum Føroya Arbeiðarafelags, Tjarnadeild 5, 100 Tórshavn

Týsdagin 8. apríl 2003 kl. 10.00

Skrá sambært lógum felagsins.

Nevndin

Hús í Vági til sølu

Um hóskandi boð fæst eru húsini matr. nr. 221b, sum eru gomlu HF-húsini, til sølu.

Send skrivlig boð til Jóhan Augustinussen, 900 Vágur ella ring 373843.

Arbeiðsmannafelagið Framtíðin

FRISØR SØKIST

Salong Bylgjan
v/Tórun Skaalum Petersen
Billugøta 2 • 160 Argir • Tel. 31 54 94

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

SANDAVÁGS KOMMUNA

Varðaleiðari, námsfrøðingur og hjálparfólk til nýggja Dagstovnin í Sandavági

Sandavágs kommuna søkir við hesum eftir varðaleiðara, námsfrøðingum og hjálparfólkum til nýggja Dagstovnin í Sandavági, sum eftir ætlan letur upp í mai mánað 2003.

Storvnurin er í 4 eindum, settur saman av vøggu- og barnagarðsstovum.

Í okkara dagliga arbeiði leggja vit m.a. stóran dent á:
- At skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn, soleiðis at tey ekkaleys kunna fara til arbeiðis og vita sær, at børnini eru í góðum hondum.
- At vit seta okkum inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- At vera úti saman við børnunum
- At hava gott foreldra- og starvsfólkasamstarv

Lønarviðurskifti
Størvini verða sett eftir avtalu, sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya kommunala arbeiðsgevarafelag.

Meira fæst at vita
um størvini við at venda sær til Rósu Samuelsen, borgarstjóra, tlf. 332470 el. 214070.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu vera Sandavágs kommunu, 360 Sandavágur, í hendi í seinasta lagi 19. mars 2003. Viðmerk á brævbjálvan "starvsfólk".

Kommunan skilir sær rætt til, um ikki nóg nógvar umsóknir eru at lýsa av nýggjum.

Kunngerð
um uttangarðsútskiftingarfund í Klaksvík

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, sum seinast er broytt við lóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund mikudagin 2. apríl kl. 10.30 í býráðshúsinum í Klaksvík.

Til viðgerðar verður uttangarðsútskifting av Uppsalahaga.

Nevndarlimir eru: Heri Samuelsen, Miðvágur og Kinna Olsen, Rituvík.

Tórshavn, tann 6. mars 2003

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður

Til sølu ella leigu

Grillin á keiini í Klaksvík v/ Árna Müller.

Tlf. 265904

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Náttúruvísindadeildin

Skrivstovustarv á Náttúruvísindadeildini

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Náttúruvísindadeildina (NVD) á Fróðskaparsetrinum.

Starvið
Talan er um 3/4 skrivstovustarv, har uppgávurnar í høvuðsheitinum eru:

- samskifta við tey lesandi og onnur
- at skráseta útbúgvingar á NVD
- annars alt vanligt skrivstovuarbeiði

Førleiki
Vit vænta at tú hevur:
- skrivstovuútbúgving
- góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt og ert røkin
- góð evni at samskifta og samstarva við onnur
- góðan kunnleika til mál
- teldukunnleika á brúkarastøði

kunnleiki til nýtslu av kunningartøkni (t.d. dagføring av heimasíðu) er eisini viðkomandi

Løn
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, 2. flokkur.

Umsókn
Umsóknir við avriti av prógvum, ævisøgu (curriculum vitae) og møguligum viðmælum, skulu vera NVD í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. mars 2003.

Umsóknir skulu sendast til:

Náttúruvísindadeildin
Nóatún 3
Postrúm 2109
FO 165 Argir

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til deildarskrivaran á NVD, Randi Durhuus, á tel. 35 25 50 ella á teldupostadressu randid@setur.fo

Á Náttúruvísindadeildini (NVD) á Fróðskaparsetri Føroya eru ískt 8 vísindastarvsfólk innan stødd-, alis-, evna-, lív-, hav-, jarðalis- og ravmagnsverkfrøði. Ein laborantur og ein laboratoriiteknikari eru á starvsstovuni og ein deildarskrivari í umsitingini. Í løtuni eru tríggjar Ph.D.-verkætlanir í gongd á NVD, og eru tær innan seismiskar signalviðgerðarhættir og modellering av alduviðurskiftum við Føroyar. NVD veitir Bachelor of Science (BS) útbúgvingar innan lívfrøði, ravmagnsverkfrøði, kolvetnisverkfrøði, kunningartøkni, teldufrøði og jarðalisfrøði. Undirvísingin verður veitt av starvsliðinum á NVD og av uml. 30 uttanseturs undirvísarum, ið eru á øðrum stovnum og virkjum bæði í Føroyum og uttanlands. Í løtuni eru um 35 lesandi á NVD, harav 18 taka BS í kunningartøkni sum hálvtíðarlestur. Harafturat eru um 20 stakgreinalesandi.

Dámar tær væl
at fáast við hár ella smyrsl
- so er hettar kanska
nakað fyri teg.

Skúlin tekur bara 2 ár.
Tú er vælkomin at senda
eina umsókn sum skjótast.

Tann Føroyski
Hárfríðkanarskúlin
Postboks 1047
FO-110 Tórshavn
Tel. 262537 ella
Tel. 311683 eftir kl. 20.00

Sosialurin 311820

Jeepur til sølu

Nissan Terrano R20, 4 hjóls trektur, turbodiesel v/ intercooler, árg. 1999.

Ring 28 20 71

Bátur við veiðiloyvi til sølu

25 fót's føroyskt bygdur bátur til sølu, um hóskandi boð fæst.

Báturin, sum er bygdur í 1980, hevur eini 16-20 hk. Sabb. Er útgjørdur við WHF, gps'ara við plottara og litekkoloddi og hevur annars alla neyðútgerð. Hevur veiðiloyvi í bólki 5 D.

Ringið tlf. 448990/222569

Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480